**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



## »200 Decibel«

# Fjoll, fres, skrál og punkrokkur alt í senn




**UMMÆLI** ★★★★★★
*Tutl*

**Summir bólkar gera tað best, tá teir brúka nógvar tímar við at taka upp í studio. Men so eru aðrir bólkar, sum rokka somikið nógv, at teir gera tað væl í studio, men gera tað uppaftur betri live. 200 eru tað seinna av hesum**

Tí er tað eisini øgiliga væl hóskandi, at teir júst hava givið eina live-fløgu út. Fløgan, ið eitur »200 Decibel« varð upptikin, tá 200 framførdi á Roskilde festivalinum í 2006.

### Má upplivast í núinum

Tað eru tvær orsøkir til, at eg haldi, at ein bólkur sum 200 ger tað best live.

Tann fyrra er, at slíkur punkrokkur má upplivast í núinum. Tað er ikki tí, at studiofløgurnar hjá teimum ikki eru feitar ella spontanar, men hendan livefløgan er bara uppaftur feitari og meira spontan, tí alt á henni hendir beint har og beint tá, teir stóðu á pallinum á Roskilde fyri gott og væl tveimum árum síðani. Tað ger heildarinntrykkið rátt, beinrakið og ræðuliga hart.

Tann seinna orsøkin er, at 200 og kanska serliga forsangarin Niels A. Galán hava ein stuttligan, provokerandi humor. Tað kemur framm ígjøgnum tekstirnar í ein ávísan mun, men ongantíð so væl, sum tá Niels sleppur at sláa seg leysan framman fyri einari kókandi fjøld. Tað skemtið og tann provokatiónin, sum mann upplivir á livekonsertum hjá teimum, er nevniliga komið við á hesa livefløguna. Og tað er eitt stórt pluss í sær sjálvum, tí boðskapurin fer frá at bara vera politiskt provokerandi til at verða tað uppá ein stuttligan, sarkastiskan máta við frágreiðing um tekstirnar og/ella skemti millum sangirnar.

### Heildin er framúr

»200 Decibel« er sett saman av nøkrum av bestu løgunum frá teimum trimum studiofløgunum, 200 hava givið út higartil. Tað gongur skjótt fyri seg; teir tríggir Niels, Mikael Blak og Uni Árting rokka og fresa, alt teir kunnu, og fólkið elskar tað. Løg sum »Tað einasta góða«, »Muscleman Blað«, »Fjern den klud«, »Sig ikki nei, Kaj« og »Drotningavitjan« saman við rópandi og skrálandi fjøldini, gjøgnumtreingjandi Elvis-ljóðinum í røddini hjá Niels, fjolli og harcore punkrokki ger »200 Decibel« til eina framúr góða live-fløgu, sum avgjørt hevur uppiborið á fáa seks stjørnur. Væl gagnist.

## Komandi fløgur

### Veto

**Heiti:** Chrushing Digits
**Útgávudagur:** 5. mai
**Plátufelag:** Reset08/Sony BMG



**Stutt um:**
Tað eru nú tvey ár síðani, at danski bólkurin Veto kom við debutútgávuni »There's A Beat In All Machines«. Tann 5. mai kemur næsta útgávan hjá teimum, ið verður kallað »Crushing Digits«. Tónleikurin á hesari útgávuni sigst at vera meira dansivinarligur og eksperimenterandi enn tann á tí fyrru. Forsangarin, Troels Abrahamsen, sum eisini gongur undir DJ heitinum Super-Troels, sigur m.a um komandi fløguna, at kompositiónirnar á henni eru einfaldari, ímeðan arrangementini eru meira innviklað, og at teir gleða seg til at møta fólki við hesum nýggja, elektroniska ljóðinum.

Keyp fløguna á cd-wow.com
**Net:** myspace.com/vetosite

### Gavin DeGraw

**Heiti:** Gavin DeGraw
**Útgávudagur:** 5. mai
**Plátufelag:** Sony BMG



**Stutt um:**
Fyri gott og væl fimm árum síðani gav Gavin Degraw út fløguna »Chariot«, sum eisini gjørdist stóra gjøgnumbrotið hjá honum. Næsta útgávan hjá honum, ið kemur á hillarnar hendan mánaðin, fer at flyta seg meira yvir í rokkættina, men fer alíkavæl eisini at innihalda nakrar klaver kompositiónir. Kærleiksløgini, ið domineraðu á fyrri útgávuni hjá honum, fara eisini at vera at finna á hesari, tó við tyngri gittara og skjótari rútmu.
Komandi fløgan, ið kallast »Gavin DeGraw« er framleidd av Howard Benson, ið fyrr hevur arbeitt við nøvnum sum My Chemical Romance, Daughtry og Motörhead.

Keyp fløguna á amazon.co.uk ella digitalt á iTunes.
**Net:** myspace.com/gavindegraw

### Iron Maiden

**Heiti:** Somewhere Back In Time (Best of '80-'89)
**Útgávudagur:** 12. mai
**Plátufelag:** EMI




**Stutt um:** Í næstan 30 ár hevur heavy metal bólkurin Iron Maiden borðreitt fjepparum kring heimin við hørðum rokktónleiki og enn harðari konsertum. Bólkurin er júst nú á heimsumfatandi konsertferð, sum gongur við strúkandi ferð, og fyri at seta prikkin yvir i'ið, hava teir avgjørt at geva út eina savnsfløgu, kallað »Somewhere Back In Time - The Best of: 1980 – 1989«.
Hetta er eitt savn av løgum frá teirra fyrstu sjey útgávum umframt einari live útgávu. Er allarhelst eitt gott boð til einhvønn, ið júst hevur uppdagað Iron Maiden og ynskir at fáa eina samanumtøku av yrkisleiðini hjá teimum.

Keyp fløguna á amazon.co.uk ella á play.com
**Net:** myspace.com/ironmaiden

### Kings X

**Heiti:** XV
**Útgávudagur:** 19. mai
**Plátufelag:** InsideOut Music



**Stutt um:**
Amerikanski rokkbólkurin King's X, ið er kendur fyri sína feitu samanseting av progressivum metallið, grunge, funk, soul, gospel og blues og tekstir, ið mestum altíð snúgva seg um persónlig stríð hjá bólkalimunum, gevur í næstum út fløguna »XV«
»XV« er upptikin og miksað í Wireworld Studios í Nashville, Tennessee við framleiðaranum Michael Wagener, sum eisini framleiddi seinastu fløguna hjá teimum, »Ogre Tones«, ið kom út í 2005. Umframt King's X hevur Wagener eisini arbeitt við eitt nú Metallica, Megadeth, Skid Row og Alice Cooper.

Bílegg fløguna longu nú á kingsxrocks.com ella á amazon.co.uk
**Net:** myspace.com/kingsx

### Scarlett Johansson

**Heiti:** Anywhere I Lay My Head
**Útgávudagur:** 19. mai
**Plátufelag:** Atco Records



**Stutt um:**
Tey eru óivað mong, ið bíða bæði í spenningi og í skepsis eftir debutfløguni hjá sjónleikarinduni Scarlett Johansson. Vónirnar fyri fløguni eru ógvuliga ymiskar, men eftir øllum at døma kunnu vit vænta okkum ein heilt góða útgávu frá hesi ungu kvinnuni.
»Anywhere I Lay My Head« inniheldur tøkuløg hjá Tom Waits, harímillum eitt lag, nevniliga »Song For Jo«, ið er skrivað av Scarlett sjálvari. Við á fløguni eru m.a Nick Zinner úr Yeah Yeah Yeahs og Sean Antanaitis úr Celebration.
Harumframt hevur hon sungið tvey av løgunum inn við ongum minni enn David Bowie.

Keyp fløguna á amazon.co.uk
**Net:** myspace.com/scarlettalbum